## VEÐRIÐ




**Í dag**
Skrið ella stormur av suðri millum 18 og 23 m/s. Yvirskýggjað við regni. Hitin millum 6 og 10 stig. Seinni um dagin minni vindur av útsynningi og vestri millum 15 og 20 m/s. Samdrigin luft og ælingur. Hitin minkar niður millum 4 og 7 stig.




**Veðrið hósdagin**
Strúkur í vindi av vestri og útsynningi, millum 13 og 18 m/s, sum seinni um dagin minkar til stívt andøvsgul upp í hvassan vind. Samdrigin luft og ælingur. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið fríggjadagin**
Andøvsgul upp í ein strúk av vindi, avd útsynningi, millum 8 og 13 m/s, samdrigin luft og ælingur. Skýggjað og regn. Hitin millum 3 og 6 stig.

# Ein risi í Hoyvík



Hóast tosað hevur verið um eina afturgongd í føroysku nettotilflytingini, so er hetta tó neyvan nakað, sum er galdandi, nú kavin liggur tjúkkur kring oyggjarnar.

Ikki minst eru teir mongu kavamenninir við til at økja um fólkatalið í landinum, og í summum førum er talan eisini um stórmenni.

Í øllum førum man hoyvíkingurin, sum vit síggja her á myndini, teljast millum bulmiklastu jólamenninar, sum hava verið at sæð í ár. Ikki minni enn tríggjar metrar er hann høgur, og hóast vit ikki hava fingið vektina at vita, so er hon helst eisini øgilig.

Stórur ella ikki, so gjørdist ævisskeið hansara her tó stutt. Dagarnar eftir jól regnaði av grimd, og so hjálpti lítið hjá einum kavamanni at tosa um støðd. Regnið tók tað mesta av kavanum, sum var, men lukkutíð vóru myndir tó tiknar, so minnini um stóra jólamannin ikki skulu hvørva.

Og hvør veit. Kanska fær hesin eisini onkran eftirkomara í hesum døgum. Týsnáttina fór tað aftur at hvítna kring landið, og fær tann kavin frið at liggja, so er einki so vist sum tað, at kavamenninir aftur vera at síggja kring landið. Eisini í Hoyvík.

## V4-dráttur

**í drátti nr. 1568 18.des. 2004**

**Tølini:** 2-10-14-20-21-26-27-30-34-42-51-56-67-80-82-94

**Vinnararnir eru:**
Ongin vinnari varð funnin. Vinningarnir verða fluttir til næsta drátt

**Eykavinningar:**
Snars. nr. 2888032 (Klaksvík)
Snars. nr. 2950587 (Hornið SMS)
Snars. nr. 2660451 (Farseðil)
Snars. nr. 2918451 (Løðuhandilin í Sørvági)
Snars. nr. 2937613 (Shellstøðin við Streymin)
Snars. nr. 2958204 (Statoilstøðin í Vági)
Vanl. seð. 389803 (Leirvík)

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | -8 |
| Ammassalik | -14 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -1 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 4 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 3 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -3 |
| Keypmannah. | -1 |
| Helsinki | -6 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 3 |
| Warzawa | 5 |
| Kiev | 5 |
| Bukarest | 4 |
| Paris | 3 |
| Madrid | 5 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 11 |
| Athen | 16 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 10 |
| Beijing | -3 |
| New Dehli | 14 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | -- |
| New York | -3 |
| Miami | 13 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 31 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 26 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár**
Eitt stormlágtrýst, 960 hPa yvir Danmarkarsundinum flytur seg í ein landnyrðing. Um kvøldið flytur eitt nýtt lágtrýst, umleið 955 hPa, seg til Danmarkarsundið, og tilhoyrandi brúgvaløg nærkast Føroyum



**Í dag**
Eitt nýtt lágtrýst flytur seg gjøgnum Danmarkarsundið og tilhoyrandi brúgvaløg fara framvið oyggjunum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 27/12 kl. 06⁰⁰–28/12. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,4°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° - Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 16,0 mm – mált frá 27/12 kl. 06⁰⁰–28/12 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 198,4 mm

RADIOHANDILIN
v. Persson & Persson
Landsins bestu parabolskipanir



· Søla og tænasta
· Verkstaður
· Antennu- og parabolmontering
· Útleigan

N. FINSENSGØTA 16 · TEL 31 82 77
e-mail: radioep@post.olivant.fo

**VESTFALLSKYRRINDI**

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 29. des | 08.36 | 20.56 | 07.36 | 19.56 | 07.51 | 20.11 | 10.36 | 22.56 | 11.36 | 23.56 | 06.51 | 19.11 | 05.51 | 18.11 | 08.51 | 21.11 | 09.51 | 22.11 | 08.21 | 20.41 | 09.36 | 21.56 |
| 30. des | 09.17 | 21.36 | 08.17 | 20.36 | 08.32 | 20.51 | 11.17 | 23.36 | — | 12.17 | 07.32 | 19.51 | 06.32 | 18.51 | 09.32 | 21.51 | 10.32 | 22.51 | 09.02 | 21.21 | 10.17 | 22.36 |
| 31. des | 09.55 | 22.13 | 08.55 | 21.13 | 09.10 | 21.28 | 11.55 | — | 00.36 | 12.55 | 08.10 | 20.28 | 07.10 | 19.28 | 10.10 | 22.28 | 11.10 | 23.28 | 09.40 | 21.58 | 10.55 | 23.13 |

Kelda. Álmanakkin 2004

5 707265 100036 >